

## Grønland skal úr Fólkatinginum

Høvdu tey bæði grønlendsku fólkatingsumboðini, Lars-Emil Johansen úr Siumut og Sofia Rossen úr IA, átt tað avgerandi orðið, hevði grønlendska umboðanin í Fólkatinginum verið avtikin. Lars-Emil Johansen sigur við grønlendska blaðið AG, at grønlendingar og danir eiga at gera eina nýggja samstarvsskipan, sum avtekur ta grønlendsku fólkatingsumboðanina. Tað er sambært Lars-Emil Johansen ein náttúrlig avleiðing av, at Grønland hevur fingið sjálvstýrið. Sofia Rossen heldur harafturímóti, at fólkatingsumboðanin skal ikki avtakast, fyrr enn grønlendingar hava yvirtikið øll málsøkini.

## Svalbard hækkar

Í fleiri ár hava vit hoyrt serfrøðina siga, at heimshøvini fara at fløða, og at landið tí fer at lække tilsvarandi. Men tað finnast undantøk ella í hvussu er eitt, og tað er Svalbard. Norskir serfrøðingar siga, at havið kring Svalbard fer at fløða eins og sjógvurin aðrastaðni, tá ísurin í fjøllunum og við pólarnar hvørvur. Men tá ísurin á Svalbard hvørvur, fer landið at hækka, og tí vænta serfrøðingarnir, at Svalbard verður at kalla líka høgt sum í dag, sjálvt um havið skuldi fløtt ein hálvan metur tey næstu hundrað árini.

# Átta jarðarferðir og ein rappari

**Ein rappari og tvey spennandi kuffert tryggja, at børnini ikki verða sett skák og mát av álvaranum í átta jarðarferðum í leikinum »Heimsins bestu jarðarferðir« á Tjóðpallinum**



*Bárður Persson og Barbara Christophersen taka fast um hondina á børnunum, tá tey leiða tey við sær til »Heimsins bestu jarðarferðir«*

SJÓNLEIKUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Hamstarin Luffi er deyður, og partafelagið »Jarðarferðir« hjá átta ára gomlu Ester og Karl hevur átikið sær álvarsomu uppgávuna at jarða hann og røkja grøvina í allar ævir fyri 10 krónur.

Vit eru á Tjóðpallinum til barnaleikin «Heimsins bestu jarðarferðir«. Hátíðarliga lyftir Ester lokið av eskjuni við líkinum av Luffa og setur hana á gólvið, so lítlibeiggi hennara Gutti kann kaga niðurí. Hann kann eins væl síggja lívsins álvara í eyguni, heldur hon og við betrivitandi men »tað-skal-nokk-ganga« útrykkinum hjá Barbaru Christophersen í leiklutinum sum Ester, verða vit sannførd um, at tað nokk eisini er best.

Gutti heldur ondini, grulvar forvitin og djarvt yvir til eskjuna, í tí Bárður Persson sleppur framat í einum av sínum bestu leiklutum. Darrandi undirvørrin, mótmælandi sitringarnar í kroppinum og vantrúgvnu eyguni, tá hann bønandi hyggur uppá Ester, lata ongan iva vera um, hvat tað er, Gutti sær niðri í eskjuni - og hvussu tað følist. Við sínum lítla peikifingri roynir hann ørkymlaður at vekja Luffa. Men Ester er náðileys og smekkar lokið á aftur: soleiðis er tað at vera deyður. Punktum.

Men eina góða jarðarferð skal Luffi nokk fáa, eins og øll hini deyðu djórini fáa tað hendan summardagin, í leikinum »Heimsins bestu jarðarferðir« hjá Tjóðpallinum, tá Ester og Karl stovna partafelagið »Jarðarferðir«. Nøkur ár eru liðin, men Ester og Karl minnast týðiliga hvussu stuttligt og syrgiligt tey høvdu tað tann dagin, tey jarðaðu ein firvald, ein hamstara, eina sildafamilju, eina haru, ein pakka við fiskafingrum, 10 mýs í einum og eitt skítbýtt orð.

Leikurin er sera snildisliga og einfalt bygdur upp við at lata tey bæði hittast aftur sum hálvvaksin við hvør sínum kufferti í hondini. Sýningin hendan dagin var fyri dagstovnabørnum, og so skjótt kuffertini komu á pallin, fór forvitni sum eitt suð gjøgnum leikhúsið. Minni spennandi bleiv tað ikki, tá Ester gloppaði annað kuffertið og stakk hondina undir lokið og bankaði á okkurt, sum ljóðaði sum ein grýta.

Lítla løtu seinni verða kuffertini latin víðopin og alskyns jarðarferðarútgerð bóltar út saman við minnunum um heimsins bestu jarðarferðir.

Ester er tann, sum hugsar um alt, eisini um at ongin hugsar um øll tey deyðu djórini, og tí skulu hon og Karl taka sær av teimum. Sjálvt um Karl ikki rættiliga skilur hana, er hann við uppá hugskotið, ikki minst tí hann so sleppur at framføra onkrar av sínum eftir hansara tykki frálíku yrkingum. Kul skal tað eisini vera, so skjótt fær hann víst seg sum ein rættan rappara í hettutroyggju, sneakers og hangireyvsbuksum í líkfylginum hjá feitu mýsini, rappandi »Spikafeita nú ert tú farin ver tí varðin...« dam dada dam ...

Rættiliga ivasamt er tað kortini, hvussu nógv hann skilur av tí heila, og tað er eisini tað, leikurin snýr seg um. Her er tað serliga lítli Gutti, sum setir teir einføldu og truplu spurningarnar sum: Hvat er tað at vera deyður? Fær man ilt? Er man einsamallur? Her



brillierar Bárður Persson veruliga sum bangni, illi, grátandi og ráðaleysi Gutti, ið hevur eitt heilt serligt tak á børnunum, bæði tí tey kenna seg aftur í Gutta og samstundis eru eitt trygt vet klókari enn hann.

Størsta partin av leikinum eydnast tað væl at ríða á javnvágini millum tað stuttliga og tað óunniliga á ein hátt, so børnini ikki vera sett skák og mát av álvaranum. Men tá ein av høvuðspersónunum doyr, og verður brendur og øskan av honum leggur seg sum eitt skýggj yvir pallin, koppar leikurin yvirum eitt mark, eftir mínum tykki. Gamaní visti ein lítil genta millum áskoðararnar at siga, at hon visti væl, hvat tað er at blíva brendur, men hesa løtuna í leikhúsinum tóktust børnini fremmandagjørd.

Møguliga taki eg feil. Og tað er væl eisini tað, sum uttan iva ger tað so forbistrað torført at spæla barnasjónleikir um svár evni uttan at tosa niður til børnini at lyfta peikifingurin. Vit vita ikki, hvat tey hugsa. Tí letur »Heimsins bestu jarðarferðir« eisini heldur hegnisliga eina mynd fyri og aðra eftir upp fyri børnunum, so tey sjálvi kunnu hugsa víðari.

Hóast teksturin størsta partin av leikinum heldur fast um hondina á børnunum, er leikurin fyrst og fremst visuellur við eini ørgrynnu av lutum, sum hava ein innara, einfaldan samanhang, so børnini ikki fløkjast í teimum.

Eisini eydnast tað fínt at skifta millum fleiri aldursleiklutir, so børnini skilja, at hatta við deyðnum fer man nokk at vita meir um, tá man blívir størri. Eitt pedagogiskt snildi, sum riggar serliga væl, tí tað nettupp er ósjónligt.